# Úr oljudansi í fótbóltsgaggur



*Jørgen Niclasen, handar Jan Joensen, liðskipara á Sundabergi, ferðasteypið. Jan vardi málið hjá Sundabergi mannliga. Sum eykavinning fingu teir hvør sína vikuskiftisferð til Reykjavíkar ella Aberdeen*



*Ragnar Heinesen av Viðareiði, legði hart út og skaddi sær beinið nærum beinanvegin. Hann sær tó vælnøgdur út, her hann stendur millum vinnandi skipsfelagar sínar á Varðanum*



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, var eisini millum leikararnar. Hann spældi við manningini á Akranesi*

**Leygardagin var innandurakapping í fótbólti fyri fiskimenn. Hetta var fjórða árið á rað, at skipað varð fyri hesi tiltaki í KÍ-høllini í Klaksvík. Undirtøkan til hesar kappingar hevur verið sera góð. Hesa ferð høvdu 41 skip teknað luttøku við 230 monnum. Í ár var tað manningin á Sundabergi, ið fór avstað við sigrinum**

UNDIRHALD
*Orð og myndir*
*Rúna Sivertsen*

Hýrurin var góður í KÍ-høllini leygardagin, tá fiskimenn hittust til árligu innandurakappingina í fótbólti. Kappingin byrjaði kl. 10 á morgni og helt á til kl. 7 á kvøldi.

Støðan millum liðini var jøvn, og onkur dystur var sera spennandi. Kappingin endaði við, at Sundaberg gjørdist nr. 1, Varin nr. 2 og Søkin nr. 3.

Hesa ferð høvdu 41 manningar teknað luttøku, og longu nú er avgjørt, at kappingin komandi ár verður 29. desembur.

Trý tey vinnandi liðini fingu heiðursmerki og skreytplátu til ognar. Heiðursmerkini hevur Norðoya Bjargingarfelag latið, og skreytplátan er frá Skipalistanum.

Ferðasteypið, sum vinnaraliðið fekk í varðveitslu til komandi ár, hevur Klaksvíkar Kommuna givið.

Tá heiðursmerki og steyp vóru handaði, fekk vinnandi liðið enn eina virðisløn. Tað var stuttligt at síggja, hvussu glaðir teir vóru, tá teir fingu ein vikuskiftisferðaseðil í part frá Atlantic Airways.

Umframt hesar, stuðlar eisini Norðoya Sparikassi tiltakinum.

Um 180 mans savnaðust til borðhaldið, sum var á Skúlaheiminum eftir dystirnar. Sum altíð, var hetta ein sera stuttlig løta, har teir, sum dagliga stríðast á sjónum, kundu hugna sær saman.

Fótbóltskappingin millum fiskimenn hevur einki handilsligt endamál, men er bert ætlað til undirhald og hugna hjá fiskimonnum. Til at gjalda útreiðslur av tiltakinum, rindar hvørt skipið 1000 krónur.

- Tá peningur hevur verið til avlops, hava vit latið hann farið til eitthvørt vælgerandi endamál, sigur Palli Ziskason, sum hevur skipað fyri fóbóltskappingini hvørt ár higartil.



*Tveir vælnøgdir áskoðarar, Grímur Lassen, reiðari á Jákup B og Poul Nolsøe Laksáfoss, maskinstjóri á Norrønu. Aftanfyri situr Jórun Andreasen og stórsmílist. Jórun er mamma at kendu fótbóltstvíburðunum, Rannvá og Ragnu*



*Heldur ikki í ár lá parturin hjá Niels Olafi Sølvará eftir. At halda røðu dugir hann væl, og hann fegnaðist um, at tað fyri hvørt ár gongur framá hjá Pison. Pison og Mascot spældu ein sera javnan dyst og máttu spæla heilar 9 min. eyka, áðrenn Pison fór avstað við sigrinum*

*(Mynd Palli Ziskason)*



*Eftir dystirnar var borðhald í borðstovuni á Skúlaheiminum. Um 180 mans sótu til borðs, har borðteitt var við smyrjibreyði, øli og sodavatni*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum
at okkara elskaða kona, mamma, vermamma,
omma og langomma

**Elinborg Sámalsdóttir Lervig**
Skáli

andaðist 27. desember 72 ára gomul.

Jarðarferðin verður 31. des. kl. 12.00 úr Skála kirkju.

**Johan, Maritha, Tummas,**
**Sámal Petur og Joan Eilin**

Tey, ið vilja minnast Elinborg kunnu lata eina gávu til Leguhúsið i Nesvík.



# Høgni Hoydal er ársins neyðrakett

**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, er valdur til Ársins neyðrakett av lesarunum hjá Dimmalætting. Tað gjørdist greitt mánamorgunin, tá blaðstjórin á Dimmalætting, Ingi Samuelsen, handaði Høgna Hoydal neyðrakettina úti í Tinganesi**

NEYÐRAKETT
*Ingi Rasmussen*



940 fólk greiddu atkvøðu fyri Ársins neyðrakett. Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins og varaløgmaður, fekk ivasama heiðurin við 311 atkvøðum framman fyri Klæmint Weihe (209) og Anfinn Kallsberg (145).

Grundgevingin hjá Dimmalætting fyri at skjóta Høgna Hoydal upp til Ársins neyðrakett var ein lýsing stutt upp undir løgtingsvalið í apríl mánaði. Lýsingin stóð í Sosialinum á sjálvum valdegnum, og á henni vóru tríggjar andlitsmyndir – ein av Høgna Hoydal, ein samansett mynd av Jóannesi Eidesgaard og Poul Nyrup Rasmussen, og ein samansmeltað av Lisbeth L. Petersen og Anders Fogh Rasmussen.

Undir myndini av Høgna stóð »føroyskt« og undir hinum stóð ávikavist »hálvføroyskt« og »hálvdanskt«.

Nógv rok stóðst av lýsingini. Lýsingin skuldi eitast at vera frá Tjóðveldisflokkinum, men sjálvan valmorgunin kom ein lýsing frá lýsingarfyritøkuni Team 85, sum átók sær alla ábyrgdina av lýsingini og segði, at hon var send Sosialinum av misgávum. Nógvar gitingar vóru um, hví so var, men sagt varð so, at talan var um eina lýsing, sum ongantíð varð góðkend av Tjóðveldisflokkinum.

Spurningurin er so, um Ársins neyðrakett rakar aftur í høvdið á Dimmalætting, tá hon dettur niðuraftur. Tí tað er Dimmalætting, sum eigur Team 85.

Undir øllum umstøðum, er Høgni Hoydal útnevndur Ársins neyðrakett fyri eina lýsing, sum Team 85 hevur átikið sær ábyrgdina av.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni gjørdist annars hetta:

Høgni Hoydal: 311 - 33,1 prosent
Klæming Weihe: 209 - 22,2 prosent
Anfinn Kallsberg: 145 - 15,4 prosent
Tórbjørn Jacobsen: 134 - 14,3 prosent
Øssur Winthereig: 121 - 12,9 prosent
Jóanis Nielsen: 20 - 2,1 prosent
Tilsamans 940 atkvøður

# Hvalbingar keypt nýggjan trolara

SKIPSKEYP
*Áki Bertholdsen*

Nú hava hvalbingar keypt ein trolara afturat til bygdina. Tað er íslendski trolarin, Dala- Rafn, úr Vestmannaoyggjum, sum hvalbingar nú hava keypt.

Tað eru menninir aftanfyri djúpvatnstrolaran, Steintór, sum nú keypa ein trolara afturat.



Jákup Pauli Hammer, reiðari, sigur teir hava leingi leitað eftir einum hóskandi trolara, bæði í Íslandi, Onglandi, Týsklandi og í Noregi.

Tá ið vit tosaðu við hann sunnukvøldið, var keypið ikki endaliga avgreitt, men tað varð tað á midnátt.

Fyri nøkrum árum síðani keyptu teir á Steintór fiskiloyvið hjá djúpvatnstrolaranum, Beintu, av Tvøroyri, tá ið hon varð seld av landinum og nú hava teir so fingið ein trolara at brúka tað fiskiloyvi.

Dala- Rafn er ein djúpvatnstrolari, sum líkist Mýlingi. Hann er bygdur í 1975, men reiðarin á Steintóri sigur, at hann er væl hildin. hann hevur 1500 hestar.

Hann kostar fýra milliónir at keypa við reiðskapi, men tað er rættiliga nógv at gera við hann, áðrenn hann verður góðkendur og klárur at fara til fiskiskap.

Jákup Pauli Hammer væntar, at trolarin fer at standa teimum í 10 milliónum, tá ið hann verður klárur at fara til fiskiskap.

Arbeiðið, sum skal gerast við trolaran, áðrenn hann verður góðkendur, verður nú boðið út. Enn er sostatt óvist, nær hann kemur til landið, men nýggju eigararnir vóna, at hann kann fara til fiskiskap í mars mánað.

Hann fer at avreiða, har prísurin er bestur og tað vóna teir, verður til flakavirkið í Hvalba.

